## ENDURLÝSING: Leiðandi yvirlækni og depilsleiðari á Skurðdeplinum

Starvið sum leiðandi yvirlækni er leyst at seta skjótast gjørligt ella eftir avtalu.

Skurðdepilsleiðsan er samansett av leiðandi yvirlækna, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi og leiðandi ljósmóðir. Skurðdepilin umfatar serfrøðirnar ortopædkirurgi, gynækologi og obstetrik, parenkym kirurgi og urologi umframt oto- rhino- og laryngologi, optalmologi og odontologi. Hetta hevur við sær kanning, diagnosering, viðgerð, røkt og rehabilitering av hesum sjúklingabólkum. Deildirnar eru: kirurgiskar seingja-, operatións-, eygna- og oyra- nasa - háls, føði/barnsburðardeild við neonatalari eind, tannlæknastovu og kirurgiskt ambulatorium við dagparti, læknagongd við yvirlæknum, hjálparlæknum og læknaskrivarum.

**Ábyrgdarøki**
Sjúkrahúsleiðslan hevur yvirskipaðu ábyrgdina av samlaða rakstrinum. Leiðandi yvirlæknin hevur saman við leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi og leiðandi ljósmóðir ábyrgdina av leiðsluni av Skurðdeplinum, og eru tey staðgongufólk fyri hvønn annan, tá ein er burturstaddur. Sí umframt www.ls.fo fyri misjón, visjón, virðir og fakta hjá Landssjúkrahúsinum.

**Landssjúkrahúsið leitar eftir** einum framskygnum, sterkum og treystum leiðara við góðum yvirliti og góðum evnum til at taka avgerðir. Tað hevur stóran týdning, at tú bæði hevur hug og evni til at samarbeiða í eini toymisleiðslu, har trúfesti (loyalitetur) og opinleiki eru grundarlag fyri avgerðum og gerningum, sum depilsleiðslan tekur í mun til strategiina hjá Landssjúkrahúsinum. Leiðarin hevur ábyrgdina av starvsfólkaleiðslu, fakligari menning og førleika fyri allar starvsfólkabólkar í deplinum. Tað er av stórum týdningi, at depilsleiðslan ígongdsetir, stuðlar og tekur ein aktivan lut í grannsking hjá deplinum, bæði læknafakliga og tvørfakliga.

Depilsleiðslan skal planleggja, samskipa og fáa sum mest burturúr rakstrinum og tilfeingisnýtsluni, soleiðis at tað verður veitt ein so góð tænasta til brúkaran sum møguligt innan teir til eina og hvørja tíð galdandi karmar. Umsøkjarar skulu vera greiðir yvir, at ein týðandi partur av starvinum hevur leiðsluuppgávur við sær.

**Arbeiðsuppgávur**
- Tilfeingisbýti og fíggjarstýring
- Raðfesta leiðsluuppgávuna høgt og arbeiða fyri einari vælvirkandi depilsleiðslu í samsvar við nýmótans leiðsluaðalreglum
- Tryggja karmarnar fyri dagliga rakstrinum og starvsfólkatrivnaða
- Seta mál fyri depilin og eftirmeta tey, herundir eisini serfrøðina hjá deplinum
- Seta grannsking í gongd, góðskutrygging og menning fakliga og tvørfakliga
- Seta í gongd og fullføra serligar serfrøðir og bygnaðarbroytingar

**Førleikakrøv**
- Kirurgiskur serlækni innan relevanta serfrøði
- Leiðsluroyndir í minsta lagi frá fyrisitingarligum yvirlæknastarvi
- Leiðsluútbúgving og fíggjarligt innlit ella útbúgving ella vilja til at gjøgnumføra hetta
- Royndir við leiðslu av broytingartilgongdum
- Dugnaligur at útbýta tilfeingið innan depilin, bæði starvsfólk og annað tilfeingi.
- Evni til at hugsa og virka strategiskt og langskygt
- Kunna planleggja og strukturera mannagongdir og arbeiðshættir hjá deplinum
- Gjarna kliniskar royndir frá fleiri sjúkrahúsum
- KT-førleiki á brúkarastøði

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið er áramálssett til 6 ár og kann leingjast eftir avtalu í upp til 3 ár.

Starvið verður innskipað eftir avtalu við FAS og Fíggjarmálaráðið.

**Aðrir upplýsingar** fáast við at venda sær til Tummas í Garði, varastjóra og yvirlækna, teldupost lstumga@ls.fo telefon +298 234592 ella Bente Wennerberg, menningarstjóra, teldupost bw@ls.fo telefon +298 234598

Umsøkjarafreistin er 23. juni 2010

Gransking & menning

Sjúklingurin í miðdeplinum

Trivnaður

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

## Onnur leys størv (sí meira á www.ls.fo)

**Bioanalytikari** Umsóknarfreistin er 25. mai
**Introduktiónsstarv í Psykiatri** Umsóknarfreistin er 4. juni
**Sjúkrarøktarfrøðingur til B7** Umsóknarfreistin er 10. juni
**Læknaskrivari til Skurðdepilin** Umsóknarfreistin er 11. juni
**Yvirlækni til Med. Depilin (pædiatri)** Umsóknarfreistin er 15. juni
**Yvirlæknar í gynækologi/obstetrik til Skurðdepilin** Ums. er 25. juni

## Ergoterapeutur

Ergoterapeutiska toymið á Psykiatriska deplinum tørvar ein ergoterapeut til setan 1. juli 2010. Talan er um eitt fast starv 34 t. um vikuna.

Samstundis verður søkt eftir einum ergoterapeuti til eitt avloysarastarv 35 t. um vikuna í tíðarskeiðinum 1. august - 31. oktober 2010.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Um arbeiðið:**
Ergoterapeutiska toymið er partur av tvørfakligu viðgerðini av innlagdum og ambulantum sjúklingum. Á Psykiatriska deplinum verður arbeitt í toymisskipan eftir visjónini um samskipaða røkt og viðgerð. Ergoterapeutiska faktoymið hevur týðandi leilut í hesi skipan.

Talan er um eitt áhugavert starv við sera fjølbroyttum arbeiðsuppgávum, og arbeitt verður miðvíst við at menna skjalprógvan. Vit nýta m.a. tað kanadiska modellið sum fatanargrundarlag. Vit hava fasta avtalu um at hava lesandi frá ergoterapeutskúlanum í Esbjerg í starvsvenjing.

**Ergoterapeuturin:**
Skal hava áræði, vera sjálvstøðugur, vera opin fyri nýggjum tiltøkum og vera við til at menna tað tvørfakliga samstarvið. Vit leggja harumframt dent á persónligar eginleikar sum fleksibilitet, greiða talu, humor, áræði og evni at innganga í pliktað samstarv.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf.: 304500 og tosa við Andrias Hansen, deildarergoterapeut, lokal 5785 og 5786

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 7. juni 2010 kl. 12.00.

Setanar samrøður verða hildnar 9. juni 2010

## Varaleiðari til B8

Eitt avloysarastarv sum varaleiðari á B8 er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt til og við 31. mai 2011.

B8 er ein medisinsk kardiologisk deild við 13 seingjarplássum. Vit hava bæði akuttar og elektivar innleggingar og hava tætt samstarv við kardiologisku starvsstovuna og hjartarehabiliteringina. Vit taka ímóti lesandi frá sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og heilsuskúlanum.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- saman við deildarleiðara menna deildina
- virkandi leiðari, tá deildarleiðarin er burturstaddur
- ábyrgd av lesandi í klinikkini
- vera við í klinisku røktini at viðgera og røkta hjartasjúklingar

**Vit kunnu bjóða:**
- innleiðslu
- fjølbroytt arbeiði, og avbjóðingarnar gera starvið sera spennandi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan førleika í røkt og viðgerð til kardiologiskar sjúklingar
- fakligan førleika í kliniskari vegleiðing
- áhuga í leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólkum
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- sjálvstøðugur, kreativur og hava visiónir
- teldukunnleiki

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava:**
- kardiologiska útbúgving
- leiðsluútbúgving

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Starvslýsing og fleiri upplýsingar fáast við at ringja 304500 til Poulu Jacobsen, deildarleiðara, lokal 6068, lspouja@ls.fo ella til Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsingga@ls.fo

Umsóknarfreistin er 7. juni 2010 kl. 12.00

Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo